# E - og tónleikurin



**Peter Olof Krag Olofson, prestur**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Ja. Klaver og stakkevis af blokfløjter. Siden kom der andre instrumenter til.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Ja. Guitar. Tre-fire fingre på klaveret. Blokfløjte. Redekam. (Spillede althorn i skoleorkesteret, men det er mange år siden…spillede basguitar i et ungdomskor, men det er også mange år siden…alt er lykkeligt glemt). Nu da vi tager til Tanzania, regner jeg med at lære at spille på tromme…

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Nej.

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
– Det er vist mange år siden, at der var en lille bitte drøm. Det var vist dengang, jeg gik i klasse med en, der spillede i et poporkester, der havde fået udgivet en single-plade.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Musik er en del af Guds skaberværk, som jeg glæder mig over og som beriger mit liv. Derudover kan vi kan berige hinanden ved hjælp af musik. Vores gode ven Luther sagde engang: »Musik er en af Guds skønneste og herligste gaver, som Satan er meget fjendsk imod, for ved hjælp af den bliver mange anfægtelser og onde tanker jaget bort.«

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– Aner det ikke. Oceaner. Hvis jeg skal tælle dem, må Sosialurin ansætte mig nogle timer til at gøre det…

*Hvat er tín yndisfløga?*
– En af farvoritterne er Michala Petri på blokfløjte.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– Prøv mig.

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
– Var du med dengang, da de døvstumme sang.

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– Har jeg nogen, der er pinlig?

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– Så ville jeg have sunget en gammel slager af Johnny Reimar for Høgni Hoydal, »Du burde købe dig en tyrolerhat« (det var vist en af hans farvoritter ifølge Sosialurin), bagefter kunne vi så tage »Ved landsbyens gadekær«.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– God klassisk musik.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Gode salmer. Gospel-sange (f. eks. Oh, Happy day).

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– Ingen, for jeg skynder mig at slukke, inden jeg bliver i dårligt humør.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– Det er vist mest brudevisen – og så bliver det færøsk dans. Ellers kan 'en sjæler' (eller som Elis siger: 'Det er en rigtig sjæler') få mig til at lokke min kone ud på stuegulvet…

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– 'Imellem nattens stjerner' af Johannes Jørgensen

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?*
– Jeg vil nævne to, når det gælder sange, jeg har skrevet tekst og melodi til. Den ene skrev jeg, kort tid efter at jeg var blevet omvendt, og den var vi så nogle stykker, der siden sang til gymnasiets skolekoncert. Den hedder: 'Jeg søgte i verden.' Om det er den store kunst, skal jeg lade ligge, men det, den udtrykker, fik altafgørende betydning for mit liv. Den anden er et lille enfoldigt bordvers, jeg skrev til en børnelejr bygget over fødekæden: 'Regnen drypper, solen ler,/træer og blomster vi ser,/dyrene spiser og vi får mad/med tak til Gud vi spiser glad.' Når det gælder indspilningerne, må det være 'Se, den lille kattekilling', som min far optog på lakplade, da han var programtekniker i Danmarks Radio. Jeg sang duet med min storesøster.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– »En vej eller anden, vor Herre ved råd,/måske ikke min vej,/måske ikke din vej;/men dog ad sin egen vor Herre ved råd.« (Nr. 20 i den gamle danske salmebog).

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– Om det musikalsk var den bedste, skal jeg lade ligge. Men da jeg var messedreng på det gode skib 'Lalandia', og vi skulle losse i Sidney, fik jeg fri nogle timer og gik til operakoncert i Opera-huset (tegnet af Jørgen Utzon). Det var en stor oplevelse at være til koncert netop der.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– Hans Pauli Strøm – mon ikke han kan spille på et eller andet?

whazzzup!!!
Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Ingrid Bjarnastein, bjarnastein@mail.djh.dk
Til: post@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Jesus sum superstjørna

Stórfilmurin hjá Mel Gibson um seinastu 12 tímarnar hjá Jesusi her á fold varð í gjár frumframsýndur í størsta partinum av Evropa.

Filmurin "The Passion of the Christ" hevði frum-framførslu yviri í USA seinast í februar mánaði, og hevur hann verið forsíðu søga í fleiri bløðum, tí hann av fleiri verður mettur at vera anti-semitetiskur. Fimm teir fyrstu dagarnar komu 117,5 milliónir dollarar í kassan. Hetta kann millum annað samanberast við triðja part av Lord of the Rings - The Return of the King, sum megnaði at toga 124,1 milliónir dollarar úr lummunum hjá amerikumonnum fimm teir fyrstu dagarnar, hann varð vístur.

The Passion of the Christ hevur fingið ógvuliga blandaða umtalu. Nøkur amerikonsk bløð kalla hann fyri ein sadomasokistiskan splattara, meðan onnur hava bert gott at bera filminum.

Filmurin hevur fingið hørð ummæli frá jødiskum bólkum í heiminum, og sambært Politiken kalla danskir jødar eisini filmin fyri antisemitistiskan. Ein talsmaður fyri Mosaiska Trúarbólkin sigur við Ritzau, at um filmurin var veruleiki, so hevði Jesus verið deyður, tá 10 minuttir vóru farnir av filminum.

Eisini í USA hava jødar lyft peikifingrinum. Longu áðrenn filmurin var frumframsýndur, segði ein jødiskur leiðari, at filmurin kundi framprovokera antisemitismu. Hetta kemst av, at jødarnir meta, at teir í filminum fáa ein stóran part av skyldini fyri deyða Jesusar.

Hóast ymisku meiningarnar um filmin, so megnar hann í øllum førum at fylla biografhølini kring heimin. Eisini í USA, sjálvt um filmurin verður spældur á armenskum og á latíni.

Jim Caviezel, sum spælir leiklutin sum Jesus í filminum, var fyrr í mars mánaði og heilsaði uppá pávan, sum eisini hevur sæð filmin. Filmurin varð vístur fyri honum í tveimum pørtum, so 83 ára gamli pávin ikki varð noyddur til at sita og hyggja so leingi í senn. Ein talsmaður fyri Vatikanið sigur, at pávin metti, at filmurin vísti Jesu deyða soleiðis sum hann var.

Mel Gibson hevur sjálvur fíggjað, verið við til at skriva og leikstjórna filmin. Nú hevur hann ætlanir um, at gera ein jødiskan cowboywestern, sum hann kallar tað. Ein film um jødisku Chanuka-veitsluna.



# FBI hevði upplýsingar um álop frá al-Qaeda

**Fleiri mánaðir fyri atsóknina tann 11. september í 2002 vistu fleiri týðandi amerikanskir embætismenn, at al-Qaeda ætlaði at nýta flogfør í einari yvirgangsatsókn. Tað sigur eitt fyrrverandi starvsfólk hjá FBI**

HOYRING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Condoleezza Rice hevur sagt, at amerikonsku myndugleikarnir vistu einki um nakra álopsætlan fyri tann 11. september í 2001. Hon sigur ósatt, sigur eitt fyrrverandi starvsfólk í FBI. Í næstu viku skal Rice avhoyrast í Senatinum*

Avdúkingin kemur serliga trygdarráðgevanum hjá Bush, forseta, Condoleezzu Rice, illa við, tí hon hevur hildið uppá, at myndugleikarnir fingu onga ávaring undan atsóknini. Men tað er ikki rætt, sigur tann 33 ára gamla Sibel Edmonds. Hon vil vera við, at Rice sigur ósatt.

Við bretska blaðið The Independent sigur Sibel Edmonds, at í sambandi við arbeiðið hjá FBI sá hon skjøl, sum vísa, at Condoleezza Rice hevur ikki sagt sannleikan um hetta málið.

– Har vóru upplýsingar um, nær atsóknin væntandi skuldi setast í verk, hvussu hon skuldi fremjast, hvørjir fóru at taka lut í henni, og hvør kundi hava givið boð um hana. New York, Washington og aðrir býir vórðu eisini nevndir. Alt stórir býir við stórum háhúsum, sigur Sibel Edmonds.

Hon arbeiddi fyrr sum týðari hjá FBI, og hon hevur longu givið teirri serligu kanningarnevndini hjá Senatinum upplýsingar um tað, sum hon sá í sínum arbeiði hjá samveldisløgregluni. Og hon er ikki í iva í síni søk.

– Nevndin hevur fingið allar upplýsingar, bæði um skjøl og dagfestingar, og har er eingin ivi. Hetta eru ikki leysasøgur, men sannleikin, og alt kann staðfestast, sigur Sibel Edmonds við The Independent. Hon var ein av fleiri týðarum, sum arbeiddu fyri FBI mánaðarnar upp undir atsóknina 11. september í 2001.

Tað er einki at ivast í, at avdúkingin hjá Sibel Edmonds verður eitt av høvuðsevnunum, tá kanningarnevndin hjá Senatinum fer at avhoyra Condoleezzu Rice í næstu viku. Nevndin hevur leingi kravt at sleppa at avhoyra hana, men Hvítu Húsini hava sagt nei. Men í vikuni slakaði forsetin, og fyrrakvøldið bleiv upplýst, at hon skal avhoyrast hósdagin ella fríggjadagin í næstu viku.

# Bin Laden bað okkum drepa amerikanarar

**Osama bin Laden bað leiðararnar í asiatiska yvirgangsfelagsskapin um Jemaah Islamiyah beina fyri amerikanarum**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Jemaah Islamiyah skipaði fyri teirri blóðugu atsóknini á frítíðaroynni Bali í oktober í 2002, og nú viðganga nakrir fyrrverandi leiðarar í felagsskapinum, at tað var Osama bin Laden, sum bað teir skipa fyri atsóknum fyri at beina fyri amerikanarum.

– Í einum boðum frá bin Laden fingu vit at vita, at tíðin var komin, til at allir muslimar skuldu hevna seg inn á amerikanararnar, tí USA hevur dripið og gjørt seg inn á muslimar allastaðni, segði ein av fyrrverandi leiðarunum í Jemaah Islamiya, Mohamed Nasir Abbas, í samrøðu við sjónvarpið í Malaysia fyrrakvøldið. Sambært fyrrverandi leiðaranum fingu teir boðini frá bin Laden á heysti í 2000.

Nasir Abbas og tríggir aðrir fyrrverandi leiðarar í Jemaah Islamiyah, sum sita fongslaðir í Indonesia, siga, at teir vóru í venjingarlegum hjá al-Qaeda í Afghanistan.

Mannarættindafelagsskapir í Indonesia og Malaysia siga seg ivast í tí, sum teir fýra siga nú. Felagsskapirnir siga, at tað er ikki óhugsandi, at menninir eru vorðnir píndir í tí indonesiska fongslinum, og at teir vórðu noyddir at siga tað, sum teir søgdu í sjónvarpinum.



*-Osama bin Laden bað okkum drepa amerikanarar, sigur ein fyrrverandi leiðari í yvirgangsfelagsskapinum Jemaah Islamiya*

# Ongin matur til Gaza

**ST-stovnurin, sum hjálpir neyðstøddum palestinskum flóttafóilkum, noyddist í gjár at gevast við matvøruflutninginum til Gaza.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

UNWRA kunngjørdi í gjár, at stovnurin var givin við at útvega teimum umleið 600.000 neyðstøddu palestinsku flóttafólkunum í Gaza-geiranum mat og aðrar neyðsynjarvørur, tí ísraelsku myndugleikarnir høvdu lagt felagsskapinum meinbogar í vegin.

Í kunngerðini stóð eisini, at matvørugoymslurnar í Gaza-geiranum eru at kalla tómar, og at støðan kann gerast álvarssom. Umleið 60 prosent av palestinunum í Gaza liva undir fátækramarkinum og hava dagliga tørv á hjálp frá UNWRA.

Ísraelsku myndugleikarnir umbóru seg við, at teir høvdu verið noyddir at herða trygdartiltøkini á markinum til Gaza-geiran fyri at forða fyri, at vápn verða smuglað um markið. Tey herdu tiltøkini skuldu eisini forða sjálvmorðsbumbumonnum at sleppa til Ísraels, søgdu myndugleikarnir.

UNWRA sigur, at teir líðandi palestinararnir í Gaza hava tørv á minst 250 tonsum av mati og øðrum neyðsynjarvørum um dagin.